## Vil hava álop

Í USA vil Joseph Lieberman, senatorur, hava Barack Obama, forseta at geva hervaldinum boð um at søkja at yvirgangsmálum í Jemen sum skjótast. Tað sigur sjónvarpsstøðin Fox News. Lieberman vísir á, at nigeriski maðurin, sum ætlaði at spreingja eitt amerikanskt flogfar, hevði verið á venjuingarlegu í Jemen. Maðurin skal eisini hava sagt, at hann er bara tann fyrsti, og at fleiri av hansara feløgum fyrireika seg til at søkja at amerikonskum málum. Tí heldur Joseph Lieberman, at USA eigur at bera skjótt at.



## Vilja síggja gos

Forvitin ferðafólk í túsundatali streyma nú til gosfjallið Mayon í Filipsoyggjunum, sum byrjaði at goysa fyri 14 døgum síðani. Gosfjallið er í landspartinum Albay, og guvernørurin har sigur, at í løtuni koma umleið 2.400 ferðafólk um dagin at eygleiða gosið. Vanliga plaga umleið 200 ferðafólk at koma hagar um dagin hesa ársins tíð, men nú eru øll gistingarhúsini full, sigur hann. Myndugleikarnir eru ikki fegnir um ferðafólkini. Tey halda ikki trygdarreglurnar, og tí stúra myndugleikarnir fyri, at onkur av teimum fremmandu fer ov nær sjálvum gosinum, skrivar AP.

# føroyska oljuvinnu




*Her síggjast loyvini á føroyska landgrunninum. Statoil hevur boðað frá, at tað fer at bora ein brunn inni á landgrunninum næstu tvey árini. Haraftrat er rættiliga áhugavert at frætta, hvat Staoil fer at fyriitaka sær úti við markið í loyvi 008. Statoil tók á seg leiklutin sum fyristøðufelag fyri hálvum ári síðani, tá Chevron tók seg úr loyvinum og sum skilst hevur felagið fingið longt loyvi- til 17. januar í 2010. Innan ta tíð skal avgerð takast, hvat skal henda í hesum loyvinum. Stóri spurningurin er so, um enn ein brunnur fer at koma burtur úr í hesum loyvinum, sum liggur so tætt uppá stóra oljufundinum hinumegin markið, Rosebank*

fara undir eina so stóra íløgu, so má tað takast sum eitt stórt framstig fyri leiting á landgrunninum, ikki minst nú fleiri feløg hava tikið seg úr økinum. Ein avtala við Jarðfeingi í januar mánað, tá avtalan gongur út, sigur heldur ikki so lítið um, hvat feløgini vænta sær at finna í undirgrundini.

Vit skulu heldur ikki gloyma, at ENI fer at bora ein brunn í 2010. Átekur Statoil sær at bora ein brunn afturat, til dømis í 2011, so er oljutilgongdin framvegis væl í gongd, og sannlíkindini fyri eini komandi føroyskari oljuvinnu er nógv bjartari.

### Hini loyvini

Umframt loyvi 008, so hevur Statoil fleiri onnur loyvi á Føroyaøkinum, har avgerðir eisini skulu fella í 2010, um farast skal víðari við teimum. Har hevur oddamaður í felagnum longu gjørt greitt í samrøðu við Sosialin og Rás2 fyrr í ár, at felagið er sinnað at bora ein brunni inni á landgrunninum. Hetta kann merkja, at í veruleikanum fer Statoil binda seg til at bora tveir brunnar á føroyska landgrunninum komandi árini.

So lítil ivi er um, at árið 2010 verður sera avgerandi fyri eini framtíðar føroyskari oljuvinnu.

Hini fyristøðufeløgini á landgrunninum, sum standa fyri seks øðrum loyvum, eru ENI, Faroe Petroleum og Sagex.




*Rúni M. Hansen, stjóri á Statoil, váttar fyri Sosialinum, at samráðingar eru í gongd við myndugleikar og onnur oljufeløg, men vil ikki gera viðmerkingar til, hvat samráðst verður um*